# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bankapakkar

Á summum økjum er tað ein fyrimunur at hoyra til eina størri eind, tá talan er um eitt land við 49.000 íbúgvum. Einum bankakervi tørvar stabilitiet, eitt trúverdugt eftirlit og eina almenna skipan aftanfyri, sum onnur hava álit á. Hetta álit hevur nakað við støddina og fíggjarligar musklar at gera.

Undanfarna samgonga vísti serstakliga vánaliga dømikraft á fíggjarøkinum, tá hon almannakunngjørdi, at føroyska ekspertisan undir Fíggjarmálaráðnum skuldi yvirtaka fíggjareftirlit við føroysku bankunum.

Síðani hesa útmelding er so tað hent, at bankar eru farnir um koll kring heimin, og fyri okkara granna fyri norðan hevur kreppan merkt, at nærum alt teirra bankakervi er farið á heysin ella er vorðið nationaliserað. Krøvini mótvegis hesum bankum eru astronomisk, og tað verða nógv ár, áðrenn nakað uttanlands trúvirði verður aftur á íslendskum bankum.

Føroyskir bankar eru betri fyri, tí at teir hoyra undir danskt fíggjareftirlit og hava møguleika at koma undir danskar hjálparpakkar. Tað er, um man vil tað ella ei, ein sannroynd, at danski staturin hevur eitt betri kredittvirði og álit, enn Føroya Landsstýri. Hetta nýtist ikki at hava nakað at gera við, hvussu dugnaligt Føroya Landsstýri er, men er fyri tað mesta bert ein spurningur um stødd og søgu.

Tað er sum tá ein brúkari skal keypa onkra tænastu. Um ein veitari hevur víst, at hann hevur megnað sína uppgávu væl í eitt áramál, so hevur hann ein fyrimun framum ein, ið skal í holt við sína fyrstu uppgávu av slagnum.

Eitt føroyskt fíggjareftirlit er eitt ivasamt hugskot í bestu tíðum, og í hesum tíðum er tað eitt beinleiðis tápuligt hugskot.

Sjálvandi er tað beiskt politiskt hjá Tjóðveldi at viðganga, at bankapakkin kom væl við, og var ein sjálvsagdur fyrimunur við okkara ríkisrættarligu støðu. Neyvan roknaði nakar við, at flokkurin fór alment út við nøkrum takkarrøðum, men at hann skuldi fara í hina grøvina, har hann uttan ábyrgd fer í almennan polemikk um tiltøkini, var ikki væntandi.

Ein partur av álitinum til almenn inntriv viðvíkjandi bankum er, at man kann demonstrera politiskt støðufesti. Um einstakir politiskir flokkar vilja brúka eina støðu til at manifestera seg sjálvan og sáa iva um hesi inntriv, so er tað skaðiligt fyri álitið. Føroysku bankarnir eru undirlagdir danska fíggjareftirlitið, og tí er tað sjálvsagt, at teir skulu hava møguleikan at fáa lut í eventuellum almennum donskum bankatiltøkum.

Tað er lítið at ivast í, at einki verður trýst niðurum oyrini á einum banka, sum ikki vil hava slíka hjálp. Um danska stjórnin og føroyingar vilja hava ein dialog um hetta, so eigur hesin dialogur at fara ígjøgnum Føroya Landsstýri.

**Sosialurin**

# Koppseting til tín og tín,...men tíverri ikki til tín?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Týsdagin verður onnur viðgerð av uppskotið til samtyktar frá Tjóðveldi um koppseting móti lívmóðurhálskrabba. Uppskot til samtyktar verður nýtt, m.a. um eitt landsstýrisfólk longu hevur eina heimild, men enn ikki nýtir hana.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum gjørdi beinanvegin greitt, at hann ikki ætlaði nýta pening til hesa koppseting í 2009. Í fíggjarnevndini bleiv avgjørt at seta eina millión av á fíggjarlógini fyri 2009 hóast tað kostar 1,4 millión um allar 12 ára gamlar gentur skulu koppsetast.

**1 millión er ikki nóg mikið**
Stutt kann sigast, at upphæddin er ov lítil. Um allar 12 ára gamlar gentur skulu koppsetast kostar tað 1,4 millión. So upphæddin er lítlan triðing ov lítil.

**Hvørjar skulu koppsetast?**
Fleiri okkara sita nú sum Kánus og spyrja:

Hvørjar 12 ára gamlar gentur fáa nú møguleikan fyri koppseting?

Tær, sum koma fyrst til læknan?

Tær, sum hava foreldur sum eru fíggjarliga illa fyri?

Tær, sum eru sosialt illa fyri?

**Fyribyrging loysir seg altíð best**
Hví er so trupult at samtykkja uppskot sum ongantíð fer at gerast annað enn ein íløga. Um tað snýr seg um krónur og oyru, hvat kostar krabbameinsviðgerð, innlegging, sjúkufrávera, ferðing og kanska penjón ikki samfelagnum? Fyri ikki at nevna ta sorg og undantaksstøðu øll familjan er merkt av undir og eftir álvarsliga sjúku.

Øll tøl og allar kanningar vísa, at fyribyrging altíð bæði er betri og bíligari enn viðgerð.

**Føroyskar kvinnur oftari lívmóðurhálskrabba enn aðrar**
Koppsetingin kann fyribyrgja álvarsligari sjúku og í ringasta føri deyða. Saman við screening kann koppsetingin nærum útrudda ávís sløg av lívmóðurhálskrabba fyri eina lutfalsliga lítla upphædd.

Tøl vísa, at føroyskar kvinnur fáa staðfest lívmóðurhálskrabba tvífalt so ofta sum í londunum rundan um okkum. Eisini er vert at nevna, at tað oftast eru tær kvinnurnar, sum eru ringast fyri sosialt, sum fáa lívmóðurhálskrabba. Hesar kunnu vera fíggjarliga illa fyri og hava tí ikki pening til koppsetingina.

Á leið 18 kvinnur fáa staðfest lívmóðurhálskrabba árliga – helvtin er undir 45 ár.

Lat okkum vóna at eitt samt ting tekur undir við uppskotinum týsdagin – hava vit ráð at lata vera?

# Samsýningin hjá býráðslimunum í Tórshavn

JAN CHISTIANSEN
býráðlimur í Tórshavn



Nógv kjak hevur verið um samsýningina hjá býráðslimunum í Tórshavn.

Valnáttina bakaðu Javnaðarflokkurin og Tjóveldisflokkurin eina politiska revakaku, sum m.a. skuldi gera tað møguligt hjá tveimum býráðslimum hjá Tjóveldinum at fáa fulla løn frá kommununi.

Men nei, kommunulógin loyvir ikki slíkum politiskum revabakstri.

So var bara eitt at gera, og tað var at tosa við landsstýrismannin í fíggjarmálum, ið er javnaðarmaður eins og borgarstjórin. Jú, nú sá betur út, landsstýrismaðurin skuldi bert broyta eina kunngerð, so kundi býráðið sjálvt áseta hvørjir býráðslimir skuldu fáa hægri samsýning, og hvussu nógv hesir skuldu fáa.

Sjálvur haldi eg slíkt vera ódámligt, serliga í hesum døgum, tá uppsagnir og sparingar eru at hoyra í hvørjum tíðindastubba í kringvarpinum. Men javnaðar- og tjóveldisfólk halda - eftir øllum at døma - at ikki er skeivt at geva sær sjálvum nakað meira. Ja, sjálvt fíggjarmálaráðharrin helt tað vera heilt rímuligt, at tey fólk, ið nú vóru vald í bý- og bygdaráð, skuldu fáa eina lønarhækking.

**Hvat fáa so býráðslimir í samsýning**
Hvat er so samsýningin býráðslimirnir í Tórshavn fáa fyri teirra arbeiði? Teir fáa ymiskt, alt eftir hvussu nógvum nevndum teir eru í, og um onkur er formaður í eini nevnd ella kanska um tú ert varaborgarstjóri.

Borgarstjórin er løntur í 39. lønarflokki, við eini viðbót, sum tilsamans gevur honum góðar 50.000,- kr. um mánaðin.

Allir býráðslimirnir fáa um 6.000,- kr. um mánadin. Harumframt fáa vit 1.500, - kr. um mánadin fyri hvørja nevnd vit eru í. Formenninir í nevndunum fáa 3.000,- kr. um mánaðin. Varaborgarstjórin fær 10% av borgarstjóralønini í samsýning, tvs. 5.000,- kr. um mánaðin. Eisini fáa við nakað, um vit eru í onkrari av teimum mongu smærru nevndunum.

Har var kanska ov nógv at svølgja, men stutt kann sigast, at tilsamans fær varaborgarstjórin millum 20 og 25. 000 kr. um mánaðin. Býráðslimirnir í meirilutanum fáa millum 15 og 20.000,- kr. um mánaðin, og vit í minnilutanum fáa millum 10 og 15.000,- kr. um mánaðin.

Nú kann, hvør í sínum lagi, meta um samsýningina sum býráðlimir í Havn fáa, men umráðandi er at hava í huga, at vit arbeiða ikki í kommununi, so omanfyri nevndu samsýningar, skulu leggjast oman á okkara vanligu løn.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.